# Fimm ættarlið



*Myndin her er tikin á eldrasambýlinum í Hvalba. Lítla gentan eitur Sissal Ragnarsdóttir Nolsøe og býr í Trongisvági. Mamman er Annika Jónsveinsdóttir, omman Heidi Bech, langomman Kamma Johannessen og oldurabbin Johannes Poulsen, sum býr á eldrasambýlinum*

*Mynd: Jónsvein Bech*

## Prógv

13. des. 2006 hevur Petur Hammer, Saltangará, lokið prógv sum elektroingeniør á D.T.U. í Lyngby.

26. januar fekk Ejler Eysturtún, Tórshavn, professionsbachelor útbúgving sum socialráðgevi frá Den Sociale Højskole í Keypmannahavn.

30. januar 2007 hevur Eyðgunn Hansen, Tórshavn, lokið prógv sum teknmálstulkur, á Center for Tegnsprog og Tegnstøttet Kommunikation i København.



23. desember 2006 var Elisabeth Poulsen á Strondum, útlærd sum kost- og føðsluatstøðingur. Hon hevur staðið í læru í køkinum á Landssjúkrahúsinum.

Internet Sosialur in
www.sosialurin.fo

# Rørðsla og heilsa í Frítíðarskúlanum

**Fyri at børnini skulu læra, hvønn týdning tað hevur at eta heilsugóðan mat og at røra seg, skipaði Frítíðarskúlin í Stoffalág fyri evnisviku, har dentur var lagdur á at liva sunt**

HEILSA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Børnini sum luttóku í rørðslu- og heilsuvikuni*

Í seinastu viku arbeiddi Frítíðarskúlin í Stoffalág 60 við evninum rørðsla og heilsa, har dentur var lagdur á at eta sunt og at røra seg.

Heilsusysturin Jóngerð Poulsen var á vitjan og greiddi børnunum frá hvønn týdning tað hevur at eta heilsugóðan mat og at at røra seg.

Skipað var fyri ymiskum tiltøkum ígjøgnum alla vikuna, børnini svumu, sparkaðu fótbólt í Gundadali og spældu ymisk rørðsluspøl uttandura. Tey kliptu myndir úr bløðum - ymiskt sum tey hildu hevði við rørslu og heilsu at gera og límaðu á pappír og hongdu tað upp.

Vikan endaði við at øll dansaðu Hip Hop í fimleikarhøllini í Eysturskúlanum har dansilærarinnan Iris frá Yndi legði børnunum lag á at dansa.

Endamálið við vikuni var at gera børnini tilvitaði um týdningin av at røra seg og eta sunnan mat, og var hetta ein sera væl eydnað vika.

Í frítíðarskúlanum ganga børn úr Sankta Frans Skúla - ein fyrsti flokkur og tveir forskúlaflokkar.



*Her eru tey á ovara graslíkisvøllinum í Gundadali*



*Vikan endaði við at øll dansaðu „Hip Hop" í fimleikarhøllini í Eysturskúlanum*